Álit

í

løgtingsmáli nr. 57/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kapping (Eftirlit við prísi við marknaðargreining og nágreining av prosessparti)

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgni Hoydal, hevur lagt málið fram 18. desember 2023, og eftir 1. viðgerð tann 25. januar 2024 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 21. februar 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Brúkaraumboðið, Vinnuhúsið, Bilasølufelagið, Handverksmeistarafelagið og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Annika Olsen, Uni Holm Johannesen og Karlot Hergeirsson) hevur hesar viðmerkingar:

Hóast føroyski marknaðurin er ein lítil marknaður samanborið við okkara grannalond og tískil eisini meira viðbrekin enn aðrir størri marknaðir, sær tað í høvuðsheitum út til, at kapping í stóran mun er á nógvum økjum innan føroyskan marknaðarbúskap.

Tó, á einum lítlum marknaði er møguleikin fyri, at kappingin á nøkrum økjum kann verða meira avmarkað og viðbrekin, enn á einum stórum marknaði við fullkomnari kapping ella nærum fullkomnari kapping.

Hetta lógaruppskotið hevur tí til endamáls at geva Kappingareftirlitinum víðkaðar heimildir til at gera marknaðarkanningar, fyri betur at kunna meta um, hvørt talan er um viðurskifti á marknaðinum, ið mugu metast sum verandi kappingaravmarkandi ella kappingaravlagandi. Hesa heimild hevur kappingareftirlitið partvíst havt áður, men tó bara um staðfest brot er ávíst sambært §§ 6 og 11 í lógini um kapping.

Meirilutin heldur, at tað áliggur Kappingareftirlitinum ein serlig skylda at kanna marknaðarstøðuna innan geirar, har almennar stuðulsskipanir kunnu skeikla marknaðin. Tað er ein vanlig marknaðar-mekanisma, at tá almennur stuðul verður veittur, kann tað skapa ein ónormalan eftirspurning eftir teimum vørum og tænastum, sum eru fevndar av stuðlinum, og sum kunnu føra við sær hægri prísir og hægri vinning.

Fyri almenna myndugleikan er tað av stórum týdningi, at tá stuðul verður veittur, t.d. til grøna orkuskiftið, har m.a. hitaskipanir og persónbilar fáa rættiliga stóran almennan stuðul, at hesin stuðulin kemur brúkaranum tilgóðar, og ikki endar sum ein hægri vinningur á hesum vørum.

Í sambandi við marknaðarkanningar, so kunnu mál antin enda við, at ein tilsøgn verður givin Kappingareftirlitinum, ella at Kappingareftirlitið gevur kravboð ella at viðurskiftini verða staðfest at vera í lagi. Tað kann tykjast, sum um heimildin til at geva kravboð er eitt víðfevnt stig at taka, men

meirilutin heldur, at hesin møguleikin skal verða í lógini, sum eitt amboð í arbeiðinum hjá Kappingareftirlitinum at tryggja ella verja brúkaran í mest møguligan mun.

Eisini verður staðfest í lógini, at í teimum málum, sum enda í rættarskipanini, er tað Kappingar-eftirlitið, sum er prosesspartur.

Meirilutin heldur, at hetta uppskotið sum heild er eitt gott og neyðugt stig á vegnum, til tess at tryggja, at brúkarin kann kenna seg tryggan við marknaðin, ið vit øll eru partur av í dagligdegnum, og at tað er sera sannlíkt, at víðkaðu heimildirnar hjá Kappingareftirlitinum í sær sjálvum fara at hava eina fyribyrgjandi ávirkan mótvegis misnýtslu av marknaðarstøðum í framtíðini.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við uppskotinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:

Løgtingslóg um kapping hevur sum endamál at tryggja kapping. Tað er umráðandi, at kapping altíð er á einum marknaði, so prísstøðið ikki skeiklast.

Fyriliggjandi uppskot vil víðka heimildirnar hjá Kappingareftirlitinum at fremja sítt endamál. Minnilutin er samdur í, at tað kann verða ein fyrimunur fyri brúkaran at víðka hesar heimildir. Tað verður við uppskotnum lættari at gera marknaðarkanningar á ymsum økjum, og at hesar kunnu almannkunngerast. Kappingareftirlitið kann útfrá slíkari kanning gera avtalur við vinnugrein ella fyritøkur um leiðreglur um vinning. Tí tekur minnilutin undir við.

Í uppskotinum verður eisini heimilað Kappingareftirlitinum at geva boð. T.v.s. at um semja ikki fæst, kann Kappingareftirlitið av sínum eintingum geva lógbindandi boð um leiðreglu fyri m.a. vinning. Almenni mynduleikin fær tí heimild at áseta fyri vinnur, hvønn vinning tær kunnu hava. Minnilutin metir, at her verður gingið fríum vinnulívi rættiliga nær. Sama eftirlit, sum ger kanningina, fær eisini heimild at taka avgerð um, hvussu tað skal verða. Hesa avgerð, heldur minnilutin, at rættarskipanin skal taka støðu til, um neyðugt er við boðum.

Prísir vilja altíð verða ein spurningur um útboð og eftirspurning. Tí er rímiligt, at víðkaðar heimildir eru, tá talan er um, at Løgtingið hevur skeiklað hesa javnvág. Her verður hugsað um, tá Løgtingið samtykkir stuðul til ávísar vørur og tænastur. Tá er endamálið hjá Løgtinginum at økja eftirspurningin eftir ávísum vørum ella tænastum. Tá eigur heimild at verða hjá Kappingareftirlitinum at tryggja, at ein vinnugeiri ikki brúkar henda politiskt avgjørda økta eftirspurningin til at økja um vinningin.

Minnilutin mælir tí til at broyta § 29 a, stk. 4 um at geva boð. Broytingaruppskotið merkir, at Kappingareftirlitið einans kann geva boð um m.a. vinning á vinnugeirum, har Løgtingið hevur givið stuðul, sum er ætlaður brúkaranum og ikki ávísa vinnugeiranum. Minnilutin mælir tí til, at á økjum, har stuðul ætlaður brúkaranum ikki er, má Kappingareftirlitið leggja møgulig boð fyri rættarskipanina at taka støðu til.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, nr. 3 verður í § 29 a, stk. 4 aftaná 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
”Hetta er bert galdandi í teimum førum, tá vøran ella tænastan hevur fingið stuðul, sum er ætlaður brúkaranum.”

Viðmerkingar
Endamálið við broytingaruppskotinum er at avmarka møguleikan hjá Kappingareftirlitinum at geva boð, tá talan er um marknaðargreining sambært nýggju ásetingini í § 29 a. Við broytingaruppskotinum kunnu boð einans gevast á vinnugeirum, har vøran ella tænastan hevur fingið almennan stuðul, sum er ætlaður brúkaranum og ikki ávísa vinnugeiranum, t.d. stuðul til bilar og hitapumpur. Hetta merkir samstundis, at í øllum øðrum førum er tað rættarskipanin, ið skal taka støðu til møgulig boð.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við uppskotinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 28. februar 2024

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstforkvinna	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Karlot Hergeirsson	